# Good Vibrations

Tónleikurin fyllur nógv í føroyska summarinum í gøtum og strætum, á bøum og á strondum, á festivalum og á møtum. Men summarið fyllur eisini í tónleikinum. Nógv løg finnast, ið nærum eru um at bresta av summari. Vit hava spurt nøkur fólk um teirra summarløg.

Teitur Lassen er ivaleyst størsta tónleikanavnið, ið Føroyar hevur fostrað. Hann hevur seinastu nógvu árini ferðast kring heimin við sínum tónleiki. Hansara rødd hevur vunnið honum nógvar fjepparar, og fyrr í ár var hann valdur til besta sangara í Danmark. Teitur hevur upplivað summar í fleiri ymiskum heimspørtum og hevur ivaleyst nógv spennandi summarminnir, men tá vit spurdu hann, hvat hansara summarlag var, var svarið.

- Hatta er ein ringur spurningur, men eftir at hava hugsa eitt sindur um spurningin svaraði hann:

- Her er ikki nakað lag, sum beinleiðis flaggar á heilari stong. Men kanska ”Good Vibrations” hjá Beach Boys. Tá hugsar man um surfboards og grillpylsur. Tað er møguliga eitt perfekt popp-lag, sum Brian Wilson hevur gjørt. Har hendur so ótrúliga nógv í lagnum, men tað spælir, sum um at tað var ein løta á strondini. Og so varar tað bara í 2-3 minuttir.



*”Good Vibrations” hjá Beach Boys fær Teir Lassen at hugsa um surfboards og grillpylsur. Hann sigur eisini, at lagið føist sum ein løta á strondini*

## Mítt summarlag

***Tónleikurin fyllur nógv í føroyska summarinum í gøtum og strætum, á bøum og á strondum, á festivalum og á møtum. Men summarið fyllur eisini í tónleikinum. Nógv løg finnast, ið nærum eru um at bresta av summari. Vit hava spurt nøkur fólk um teirra summarløg.***



















